# Nógv fólk á fiskivinnuráðstevnu

**Hósdagin var stór fiskivinnustevna, sum fyritøkan Farec skipar fyri, sett av Jóannes Eidesgaard, løgmanni, á Hotel Føroyum**

RÁÐSTEVNUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tað var Jóannes Eidesgaard, løgmaður, ið setti stóru fiskivinnuráðstevnuna á Hotel Føroyum hósdagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Á stóru fiskivinnuráðstevnuni, har luttakararnir koma úr øllum verðinshornum, eru bæði fyrilestrar og kjak á skránni. Hósdagin var millum annað kjakast um stýrisskipanum í fiskivinnuni, og millum fyrilestrahaldarnar vóru Hjalti í Jákupsstovu. Tosað var um sambandið millum fíggjarligu og lívfrøðisligu viðurskiftini í fiskivinnuni, og um vinnan kann líta á tær metingar, ið verða gjørdar av stovnum.

### Løgmaður fegnaðist um útlensku vitjanina

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, setti ráðstevnuna, og hann segði millum annað í setanarrøðu síni, at hann fegnaðist um, at so nógvir útlendskir serfrøðingar tóku sær stundir at koma til Føroya at kjakast um viðurskiftini í alheims fiskivinnuni, og at hesir vildu greiða frá sínum royndum í vinnuni.

Í røðu síni segði løgmaður eisini, at í einum landi sum Føroyum er tað av stórum týdningi, at fiskivinnan verður stýrd við ábyrgd, tí at vinnan hevur so stóran týdning bæði fyri samfelagsbúskapin og vælferðarsamfelagið. Somuleiðis fegnaðist Jóannes Eidesgaard um, at hann var sera errin av, at okkara fiskidagaskipan hevur vakt so stóran ans í øðrum fiskivinnutjóðum, og at føroyingar altíð vóru klárir til at greiða frá sínum royndum við hesari skipan. Hann vísti á, at fiskidagaskipanin hevði vakt ans bæði millum politikkarar, granskarar og stjórar, og at hetta bert kann tulkast sum eitt herðaklapp tilokkum føroyingar.

Løgmaður segði eisini, at tað var umráðandi, at vit í Føroyum góvu okkum stundir til at lurta og læra av royndunum hjá øðrum, soleiðis at vit altíð eru klár til at broyta bygnaðin í okkara fiskivinnu í mun til gongdina í fiskarínum. Jóannes Eidesgaard segði, at fiskivinnan er so mikið viðbrekin, at tað er umráðandi, at ein fiskivinnutjóð sum Føroyar altíð er klár til at tillaga seg umstøðurnar.

Ongastaðnis í heiminum er stýringin av fiskivinnuni læst fast eftir einum leisti, og at tað heldur ikki eigur at verða so, segði løgmaður. Hann helt, at lykilin til eina burðardygga fiskivinnu í framtíðini eigur at verða, at mann dugir at tilpassa hegnisliga stuttfreistaðu umstøðunum, samstundis sum mann leggur ætlanir fyri framtíðina.

At enda í røðu síni nýtti Jóannes Eidesgaard høvi til at takka mongu útlendsku gestunum fyri at koma hagar, og eisini takkaði hann fyriskiparanum, Óla Samró, fyri hansara avrik í at fyriskipa eina so viðkomandi ráðstevnu her í Føroyum.

### Endaði í gjár

Ráðstevnan, ið var hildin á Hotel Føroyum, endaði á miðdegi fríggjadagin. Fríggjamorgunin vóru fyrilestrar hildnir um fíggjarviðurskiftini í fiskivinnuni, og millum annað hevði Kolbjørn Giskeødegård, leiðari fyri fiskivinnudeildini hjá Nordea bankanum í Noreg, ein fyrilestur.

Á ráðstevnuni var dúgliga kjakast um viðurskiftini í fiskivinnuni bæði í Føroyum og í øðrum fiskivinnutjóðum, og nakað av hesum fara vit at venda aftur til her í blaðnum í komandi viku.

**Leiðari til fíggjardeildina**

Søkt verður eftir fíggjarleiðara til høvuðsdeildina hjá Føroya Shell í Tórshavn.

Tá verandi fíggjarleiðari eftir gott 17 ár í starvinum eftir egnum ynski hevur valt at taka við øðrum uppgávum í fyritøkuni, hava vit brúk fyri einum nýggjum leiðara til fíggjardeildina.

**Starvið**:
Talan er um eitt sjálvstøðugt og áhugavert starv í einum spennandi umhvørvi. Leiðarin hevur alla ábyrdina av fíggjardeildini herundir
- ger av ávegis- og ársroknskapi
- rapportering til útlendska móðurfelagið
- fíggjarætlanum o.t.
- dagligari leiðslu og skipan av deildini
- roknskaparlig umsiting og samskifti við avgreiðslurnar og egnar støðir kring landið.

Leiðarin er partur av leiðslubólkinum við beinleiðis tilvísing til stjóran.

**Førleikakrøv**:
Til starvið krevst holl ástøðilig útbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving. Dentur verður lagdur á leiðaraevnir og royndir, umframt at tú ert arbeiðssamur og dugir væl at samskifta. Góður kunnleiki í enskum er neyðugur.

**Vit bjóða**:
Eitt fjølbroytt, spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning, men samstundis eitt krevjandi starv. Vit hava góðar arbeiðsumstøður og trygg starvsviðurskifti. Góð løn í samsvar við útbúgving og royndir. Eftirlønarskipan er knýtt at starvinum.

**Umsóknir**:
Skrivligar umsóknir skulu verða innlatnar í seinasta lagi mánadagin 21. juni og skulu sendast til P/F Rasmussen & Weihe, statsautoriserað grannskoðarafelag, á Glaðsheyggi, FO-100 Tórshavn, telefon nr 351700, har nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Olsen ella Klaus Rasmussen. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

www.shell.fo



**RØTTU RENNISKÓGVARNIR!**

Týsdagin 8. juni og mikudagin 9. juni hava vit vitjan av serfrøðingi frá Adidas, sum vísir tær á hvørjir eru røttu renniskógvarnir til tínar føtur.

Hygg inn í handil okkara og royn fótskannaran ið gevur upplýsingar um hvat er rætti skógvur til tín!

Í hesum sambandi hava vit tilboð upp á hesar renniskógvar:

ADIDAS response
fyrr 800,-
NÚ 550,-

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR




**Vilt tú verða ein av okkum**

**So átti tú at gjørt sum vit. Vit hava tikið eina avbjóðandi og fjølbroytta útbúgving á Tryggingarfelagnum Føroyum**

Útbúgvingin er ein tvey ára fíggjarútbúgving, sum fevnir um ein praktiskan og teoretiskan part. Tú fært hollan kunnleika um tryggingar og lærir m.a. um løgfrøðina aftan fyri tær. Tú arbeiðir eitt skifti í senn á ymiskum tryggingarøkjum. Á henda hátt fært tú innlit í okkara fjøltáttaða arbeiði í eini stórari fyritøku við yvir 100 starvsfólkum.

Tann teoretiska førleikan fært tú við at fylgja undirvísing og gera uppgávur við jøvnum millumbilum, eins og útbúgvingin gevur tær góðar møguleikar fyri framhaldandi tryggingarútbúgving til eitt nú tryggingarráðgeva ella skaðaviðgera.

Vilt tú vita meira, so ring til ein av okkara fyri at vita, hvat vit halda um útbúgvingina og Tryggingarfelagið Føroyar sum lærupláss.

Á heimasíðuni www.trygging.fo hevur tú møguleika at fáa eina nærri lýsing av felagnum og okkara virksemi. Tú ert eisini vælkomin at ringja til Jónsvein Simonsen, deildarstjóra, á tel 345551 ella fartel 213551.

Tað er ein treyt, at tú hevur studentsprógv, HF ella HH. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. juni. Avrit av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

**Arnhold Olsen, 22 ár, Klaksvík:**

"Mær dámar sera væl at arbeiða á Tryggingini. Útbúgvingin hevur verið spennandi og krevjandi. Tryggingarfelagið Føroyar er eitt stórt og fjøltáttað felag, og tí eru møguleikarnir og avbjóðingarnar nógvar. Í lærutíðarskeiðinum havi eg starvast á fleiri ymiskum deildum, og tí havi eg fingið eina breiða og góða tryggingarvitan. Arnhold Olsen, 22 ár, Klaksvík."

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · 110 Tórshavn · Tel 345600 · Fax 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt partafelag við høvuðsdeild í Havn og fimm deildum kring landið. 123 fólk starvast í Tryggingarfelagnum Føroyum. Les meira um okkum á www.trygging.fo

SANSIR TEL 355 355